# Álit

# í

**løgtingsmáli nr. 151/2018: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um tollsatsir (Toll- og vøruskráin) og løgtingslóg um meirvirðisgjald (Meirvirðisgjaldslógin)** (Strika toll á EL-bilum og ljóðbøkur gerast MVG-fríar)

Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum, Kristina Háfoss, hevur lagt málið fram 7. mars 2019, og eftir 1. viðgerð 26. mars 2019 er tað beint Fíggjarnevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi 4. apríl 2019

Undir viðgerðini hevur nevndin havt fund við landsstýrismannin í fíggjarmálum.

Undir viðgerðini er komið fram, at landsstýrismaðurin í fíggjarmálum hevur fingið upplýsingar um, at tað ikki er møguligt at avtaka Gatt-tollin í eitt avmarkað tíðarskeið. Tí hevur landsstýrismaðurin mælt til, at tann parturin av uppskotinum, ið hevur við Gatt-tollin á el-akførum at gera, verður strikaður.

Fíggjarnevndin setir tí fram soljóðandi

**b r o y t i n g a r u p p s k o t**

**1.** Frágreiðandi heitið verður orðað soleiðis:

”(Ljóðbøkur gerast MVG-fríar)”

**2.** Í skjali 1 verður:

**“Í Toll- og vøruskránni verður Gatt-tollurin (%) fyri hesi vørunummur orðaður soleiðis:**

| **Vørunummar** | **Tollsatsur (%)** | **Tekstur** |
|---|---|---|
| 87038010 | 0 | Nye |
| 87038090 | 0 | Brugte |
| 87039000 | 0 | Andre motorkøretøjer |

**”**

strikað.

Við hesum broytingum tekur ein samd nevnd undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

**Fíggjarnevndin, 9. apríl 2019**

| | | |
|---|---|---|
| Bárður á Steig Nielsen<br>formaður | Ruth Vang<br>næstformaður | Helena Dam á Neystabø |
| Kristin Michelsen | Pauli Trond Petersen | Jacob Vestergaard |
| | Bill Justinussen | |